# Reyða smæra



Merkið skal takast saman við patruljuni, liðnum ella á legu, saman við øðrum skótum.

Skótar, ið hava tikið gulu smæru kunnu fara undir reyðu smæru.

**REYÐ SMÆRA** Merkið skal takast í skótahøpi. Tað kann vera við patruljuni, liðnum ella á eini legu.

**LEGULÍV**

**Kravdar uppgávur:**

- ☐ Sova í tjaldi minst 3 dagar á rað
- ☐ Reisa tjald á rættan hátt og pakka tað saman á skynsaman hátt.
- ☐ Innrætta eitt legupláss, har tit við búreising gera eitt borð, eitt inngangsportur og reisa eina flaggstong.
- ☐ Baka bollar ella breyð á báli ella í primitivum ovni
- ☐ Duga ar kynda minst trý sløg av bálum

Valfríar uppgávur. Veljið minst fýra.

- ☐ Skipa fyri einum legubáli: kynd bálið, vel sangir og skipa fyri undirhaldi.
- ☐ Gera tvey etingaramboð og nýta tey ein heilan dag
- ☐ Gera tykkara egna legumerki- brenna, mála, tekna, brodera ella annað
- ☐ Gera ein legubálskappa
- ☐ Duga at kynda eld við sjóneygu og við tendristáli
- ☐ Gera eina legusvintu, einar grýtulappar ella okkurt annað til patruljuútgerðina.
- ☐ Royna at gera ís ein dag, tá kavi er.
- ☐ Mala korn og baka breyð ella bollar úr mjølinum
- ☐ Gera døgurðamat á báli.
- ☐ Ansa eftir leguútgerðini og halda hana reina áðrenn og aftaná legu.

## SAMSKIPAN OG ALTJÓÐA SAMSTARV

**Kravdar uppgávur:**

- ▢ Kenna til Føroya Skótaráð. (FSR) Kenna til: Stovnan, endamál, limir, samstarvi og limaskap.
- ▢ Tosa um týdningin av skótalóg og lyfti. Kenna munin á lóg og lyfti hjá teimum ymisku samskipanunum í Føroyum.
- ▢ Hava samskift við skótar í einum øðrum landi ella luttiki aktivt í JOTA/JOTI
- ▢ Luttaka á legu ella tiltaki við skótum úr øðrum samskipanum.
- ▢ Arbeiðið við tilfari frá WAGGGS. Tit kunnu eitt nú taka hugsanardagsmerkið, free being me, stop the violence ella annað https://www.wagggs.org/en

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fýra.**

- ▢ Kanna hvussu búnarnir hjá KFUK-skótunum hava verið ígjøgnum árini og gera eina framsýning ella annað.
- ▢ Útvega ella tekna eitt Føroyakort ella heimskort og seta merki á, har tit hava verið á legu.
- ▢ Lesa um Baden-Powell og royna nøkur av hansara hugskotum í "Scouting for Boys".
- ▢ Finna tilfar hjá einari aðrari samskipan og royna nøkur av teirra ítrivum.
- ▢ Gera eina máltíð úr einum øðrum landi.
- ▢ Fáa eina vinarpatrulju úr einum øðrum landi og læra um, hvussu skótaarbeiðið er í hesum landi
- ▢ Gera eitt savn við skótamerkjum úr øðrum londum. Hesi kunnu eitt nú rammast inn.
- ▢ Halda veitslu tá samskipanin hevur føðingardag

## SAMFELAGIÐ OG SKÓTAVIRKSEMI

Kravdar uppgávur:

- ▢ Duga at peila við kumpas og lesa kort. Luttaka á K-renning.
- ▢ Læra at leggja eina stuðulsbinding, meta um brunasár og skurðsár so at besta viðgerð verður givin. Viðgera lættari brunasár, smærri bit- og skurðsár, hitaslag og sólsting.
- ▢ Duga at vinda flagg í stong. Vita hvussu farið verður við merkinum.
- ▢ Duga at leggja í fastlagda síðulegu og veita bráfangishjálp.
- ▢ Læra at kasta bjargingarreip
- ▢ Læra at týða minst 5 sløg av loyniskriftum

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fýra.**

- ▢ Nýta persónlig mát til uppmáting av vídd og hædd.
- ▢ Gera ein "Svenskan" mátistokk í part og royna hann við 3 ymiskum hæddum.
- ▢ Gera 3 ymisk morsi- og kortteknsspøl.
- ▢ Gera eina kort-strikumynd (1:1000) yvir eitt øki tit kenna.
- ▢ Fara út í myrkri, senda og móttaka eini morsiboð, sum eru send við einari bjartari lykt og vita, hvussu langt hettar røkkur.
- ▢ Vitja eitt røktarheim, har tit eitt nú framføra fyri búfólkunum ella práta við tey.
- ▢ Gera ein stuttan sjónleik um at vera øðrvísi. Aftaná tosa um hendingarnar í leikinum.

## KRISTNIKUNNLEIKI OG HJÁLPARARBEIÐI

Kravdar uppgávur:

- ▢ Vita hví vit halda jól, páskir og hvítusunnu.
- ▢ Lesa trý av Jesu líknilsum og tosa saman um, hvat tey siga okkum í dag. Spæla eitt av teimum sum sjónleik fyri liðnum.
- ▢ Fáa ein prest ella kirkjutænara at greiða frá sínum arbeiði.
- ▢ Skipa fyri einari peningainnsavning, ið gagnar fólkum ið tørva hjálp. Peningurin kann eisini fara til hugsanardagsgrunnin hjá WAGGGS.
- ▢ Gera eina spurnarkapping við kristindómsspurningum og spælið tað á einum skótafundi.

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fýra.**

- ▢ Lærið tykkum tríggjar sálmar uttanat og tosið innihaldið í sálmunum.
- ▢ Kenna til kristnu siðirnir ið knýta seg at fólkakirkjuni. Kannið hvørjir tilsvarandi siðir eru knýttir at øðrum trúðarbólkum. Tosa um hvørjir munir eru og hvønn týdning teir hava.
- ▢ Gera eitt yvirlit yvir kirkjuárið við myndum
- ▢ Kunna tykkum um búnan hjá presti
- ▢ Vita hvussu sámarnir eru uppbýttir í sálmabókini. Veljið nakrir sálmar at syngja saman.
- ▢ Yrkið ein kvøldarsálm ið hóskar seg at syngja til legubál. Lærið hinar í liðnum sálmin.
- ▢ Gera eina myndarøð um eitt líknilsi úr Bíbliuni.

- [ ] Hvat halda tit at heimurin eigur at gera fyri at basa hungurneyð. Skrivið eina grein um hettar, ella ger ein film og sýnið hann framm.
- [ ] Kenna til arbeiðið hjá minst 3 altjóða hjálparfelagskapum.
- [ ] Skipa fyri einum panelfundi við skótaliðinum. Veljið minst 3 skótar í panelið, ið skulu argumentera fyri hví júst teirra hjálparfelagskapur eigur at fáa meiri pening at arbeiða við. Panelluttakararnar skulu velja sær hvør sín veruliga hjálparfelagskap at umboða. Hini í liðnum spyrja spurningar og atkvøtt verður at enda um hvør hjálparfelagskapur skal hava pening. Skipið eftirfylgjandi fyri eini innsavning og flytið pening til hjálparfelagskapin. Eitt nú kunnu til selja fløskur, halda køkutombola ella líknandi.

## NÁTTÚRAN OG UMHVØRVIÐ

Kravdar uppgávur:

- [ ] Gang túr í náttúruni. Minst 10 km.
- [ ] Kenna minst 8 fiskar, ið vanliga verða veiddir í Føroyum. Tekna minst 3 teirra.
- [ ] Læra um bjargafuglin í Føroyum og gera eina mynd av, hvar teir byggja í berginum.
- [ ] Kenna til 17 heimsmálini hjá ST. Vita hvørji snúgva seg um Náttúru og umhvørvi, og ger eina plakat ella annað ið vísir á, hvørji mál ST hevur í mun til at verja umhvørvið og náttúruna.
- [ ] Duga at bera sera skynsamt at í náttúruni, bæði tá ið umræður trygd og at virða náttúru og haga.
- [ ] Sova eina nátt undir opnum himli ella í skjóli/bivuak.

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fýra.**

- [ ] Máta ferðina av eini á og samanlíkna við vindmegina sama dag.
- [ ] Vita hvørji trø trívast best í Føroyum.
- [ ] Læra at rógva í einum báti. Verið í bjargingarvesti og gerið tað í samráð við ein vaksnan leiðara.
- [ ] Gera eina sleðu og nýta hana á eini patruljuferð
- [ ] Vaska ull, karða og tøva myndir ella brúkslutir burturúr henni.
- [ ] Gera gipsmyndir av djórasporum.
- [ ] Gera eina lítla vindmyllu og vita, um hon orkar at drýva eina dynamo.
- [ ] Ger ein tunnuflaka ið er nóg góður til at patruljan kann vera á honum uttan at hann søkkur.
- [ ] Gakk ein túr í náttúruni, har tit savna upp lesull og rusk ið tit finna á vegnum. Gerið eitt yvirlit yvir hvat til hava funnið og beinið tað burtur á

rættan hátt.

Tillukku!

Tú hevur nú staðið reyðu smæru. Merkið kann seymat á ermuna.

Næsta stig í venjingarskipanini er lilla smæra: Lilla